# E | Roknskapur

**E|Roknskapur søkir eftir royndum starvsfólki til bókhaldsarbeiði**

Vegna vaksandi virksemi søkja vit eftir einum starvsfólki til bókhaldsarbeiði vm. Ynskiligt er at tú hevur hollar royndir við bókhaldsarbeiði og hervið kann arbeiða sjálvstøðugt, hevur góðan kunnleika til Microsoft MBS Navision og C5 bókhaldsskipanirnar, og kann málbera teg á enskum í skrift og talu.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um m.a.:

- Dagligar bókingaruppgávur
- Skrivan av rokningum
- Viðlíkahald av ognarum og skuldarum
- Avstemman/uppgerðir
- Samskifti við kundar og tænastuveitarar
- Ymiskt skrivstovuarbeiði

Dagligi arbeiðsstaðurin vil í stóran mun vera úti hjá kundum okkara í Tórshavn.

Løn og setanarviðurskifti annars, verða í samráð við arbeiðsgevara.

Skrivlig umsókn við lýsing av starvsroyndum, útbúgvingum vm. skal vera E|Roknskapur Sp/f, Dr. Jakobsensgøta 18 1. hædd, Postboks 313, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 27. august 2006.

Meiri fæst at vita um starvið, við at seta seg í samband við Eyðun Mortensen á tlf. 599600.

*E|Roknskapur Sp/f er ein fyritøka ið veitir tænastur og ráðgeving innan roknskap, skatt, fyrisiting, bókhald, fíggarmál v.m. Okkara kundar umboða eitt breitt úrval innan føroysku vinnugreinirnar.*



FØROYA HANDILSSKÚLI

TEAM85

# FHS og HH staklærugreinar

**FHS- staklærugreinar**
***Undirvísingin byrjar í viku 45. Próvtøkan verður í mai/juni 2007.***

| | | |
|---|---|---|
| Enskt C | hósdag | 18.00-20.30 |
| Virkisbúskapur C | mikudag | 18.00-20.30 |
| Kunningartøkni C | mánad. og mikud. | 20.30-22.00 |
| Marknaðarførsla C | mánadag | 18.00-20.30 |

**HH- staklærugreinar**
***Undirvísingin byrjar í viku 36. Próvtøkan verður í mai/juni 2007***

| | | |
|---|---|---|
| Vinnulívsrættur C | hósdag | 18.00-19.30 |
| Virkisbúskapur B | mikudag | 18.00-20.30 |

**Innskrivingarseðil finnur tú á heimasíðu skúlans**
**Umsóknarfreistin er 28. august 2006**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**



# Leiðari
## til Dagtilhaldið Hugnin, Sandur

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir leiðara til Dagtilhaldið Hugnin, Sandur.

Arbeiðið er 15 tímar/viku. Løn sambært sáttmála.

Starvstíðin er frá 1. september 2006 og 6 mánaðir fram.

Umsóknarfreistin er 25. august 2006.

Áhugaðir umsøkjarar skulu senda umsókn til:

**Sands kommunu**
Postboks 10
FO-210 Sandur



FØROYA RÍÐINGARFELAG

# Ríðiskeið

Í døgunum 24. til 25. august 2006, verður ríðiskeið fyri kvinnum (byrjarar).

Neyðugt er at hava ross við sjálvar!

Kostnaður: Limir kr. 300,- ikki limir kr. 400,-

Tilmelding á tlf. 223333, ella t-post nbrockie@post.olivant.fo áðrenn 23. august 2006.

**Føroya Ríðingarfelag**



LMS

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir fólki at gera reint á Landsmiðstøðini frá 1. september 2006. Arbeiðstíðin er tilsamans uml. 10 tímar um vikuna, vanliga týsdag, hósdag og fríggjadag eftir klokkan 16.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra, á tlf. 318825.

Umsóknir skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. august.

lms0806

**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72 • Postboks 3084 • FO-110 Tórshavn

***Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur eina ráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum og eftirútbúgving av lærarum.*



Nýtt múraravirki

**Vit átaka okkum alt múraraarbeiði...**

sp/f MÚRARAVIRKIÐ
RDC
tel 59 20 30



**Mentamálaráðið**
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

# Fulltrúi

Eitt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í Vinnu- og miðnámsskúladeildini. Talan er um eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, sum fevnir um ymiskar uppgávur innan útbúgvingarøkið.

Umsóknarfreistin er mánadagin 4. september 2006, kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv)